


# Sjókaféin – hugnalig matstova í Runavík



Sjókaféin við Fjøruvegin í Runavík er eitt hugnaligt stað við góðum umstøðum til at keypa sær eina góða máltíð ella at leiga hølini til veitslur o.l.

Sjókaféin hevur síðan 2004 hildið til í bygninginum, har sum Eysturoyar Heilsøla var áður. Tað eru Sunneva Hansen og Karhild Johansen, sum eiga og reka Sjókaféina.

Sjókaféin er hugnalig og innbjóðandi. Her er góður køkur, og hølini eru rúmlig. Útsýnið yvir vágna er vakurt, tí bygningurin liggur nærmast sjóvarmálanum og beint yvir av bátahylinum í Runavík.

Gerandisdagar millum kl. 11.30 og 13.30 er dagsins rættur og grillmatur at fáa. Eisini fæst kalt borð við smyrjibreyði. Annars verður matur eisini koyrdur út av húsinum í sambandi við móttøkur og onnur tiltøk.

Stórur eftirspurningur er eisini eftir hølunum, sum verða leigað út til brúdleyp, konfirmatiónir, barnadóp, jólafrokostar, veitslur og onnur tiltøk. Sjókaféin hevur eisini vitjan av ymiskum bólkum av fólki, bæði føroyingum og útlendingum.

Øll eru vælkomin at ringja til okkum, og siga hvat tey ynskja. So leggja vit tað til rættis eftir teirra egna ynski, siga Sunneva og Karhild frá Sjókaféini.